Rannvá Augustinussen, VB:

# - Eitt stórt stig móti meistaraheitinum

**Liðskiparin hjá VB, Rannvá Augustinussen, vildi staðfesta meistaraheitið eftir oddabrakið leygardagin**



*- vit hildu høvdið kalt og settu okkum fyri, at verjan skuldi standa stinn, og tær skuldu ikki fáa fleiri mál, segði ein fegin Rannvá Augustinussen eftir dystin*

HONDBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ein fullkomiliga pøst Rannvá Augustinussen, ið Sosialurin fekk orðið á beint eftir sigurin á Stjørnuni leygardagin:

*- Eru tit meistarar nú?*

Nei, ikki heilt, men hetta var eitt stórt stig á leiðini.

*Tað sá rættuliga svart út í fyrra hálvleiki?*

Vit vóru ótrúliga nervøsar, og verjan riggaði slet ikki. Vit fingu heldur ikki skorað, og tær skoraðu allatíðina. Men tá ið vit sluppu av við nervarnar, koyrdu vit tað heim.

*Tær vóru á odda við tveimum málum stutt fyri leiklok, men tit komu afturíaftur?*

Ja, vit hildu høvdið kalt og settu okkum fyri, at verjan skuldi standa stinn, og tær skuldu ikki fáa fleiri mál, og tað eydnaðist okkum at vinna til síðst.

*Tit skiftu lítið út á liðnum, var tað ein harður dystur?*

Heilt ótrúliga harður dystur. Tað var so heitt, tí tað var so nógv fólk og so nógvur gangur. Tað var heilt ótrúliga hart.

*Hvussu nær eru tit meistaraheitinum?*

Nei, tað vil eg einki siga um.

Una Olsen, Stjørnan:

# -Eg haldi, at tað er avgjørt

**Liðskiparin hjá Stjørnuni, Una Olsen, heldur ikki, at VB nú fer at snáva á veg móti FM-gullinum**



*- Eg rokni ikki við, at nakað annað lið tekur VB, og málmunin fáa vit ikki gjørt nakað við, sigur Una Olsen, sum roknar við, at kappingin nú er avgjørd*

HONDBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Una Olsen sá ikki sørt vónbrotin út, tá ið vit fingu orðið á hana úti í gongini í VB-høllini.

*Er kappingin avgjørd nú?*

Eg veit ikki, um man skal takka fyri seg og verða nøgd við steypakappingina. Men so at siga haldi eg, at hon er avgjørd, tí eg rokni ikki við, at nakað annað lið tekur VB, og málmunin fáa vit ikki gjørt nakað við, so um vit vinna í Klaksvík, so rokni eg við, at vit verða ov stuttar avlíkavæl.

*Tit høvdu eina greiða leiðslu í fyrra hálvleiki, hvat hendir so?*

Vit settu okkum fyri í hálvleikinum at fara inn aftur og halda á við sama lag, men so steðga vit upp. Álopsspælið koyrdi alt ov seint, og vit fingu ikki mál. Samstundis fáa tær nógv mál í hinum endanum, har tær sleppa ígjøgnum, har tær ikki skuldi sleppa ígjøgnum.Vit kiksa simpulten í verjuni.

*Tað vóru teir somu spælararnir á vøllinum næstan allan dystin. Var tað øgiliga hart?*

Tað var øgiliga hart, men tað er tað altíð móti VB. Og til ein slíkan dyst hevur tú eisini altíð orku til spæla allan dystin.

*Tit fingu leiðsluna aftur seint í dystinum?*

Ja, men so eru vit ókoncentreraðar og gera býttar feilir. Vit hava ikki tol til at spæla runt, til vit fáa upplagdar møguleikar, og tí taka vit hálvar møguleikar, og tað kostar.

*Eru tað slíkir dystir, sum gera tað stuttligt at spæla hondbólt?*

Ja, tað er tað, hóast vit taptu. Tað er bara spell, at tað bert eru tveir slíkir dystir um árið, har man hevur nervar áðrenn dyst. Soleiðis skuldi tað verið hvørt vikuskifti.

## FAKTA UM DYSTIN:

**VB-Stjørnan 28-27(12-16)**
**VB:** Daiva Tomaite 14(6), Christina Holm 4, Gurið Mortensen 4, Rannvá Augustinussen 3, Laila Jespersen 2, Aukse Vysniaskaite 1

**Stjørnan:** Alina Olaru 8(3), Joan M. Djordjevic 4(1), Katarina Stjepanov 4(3), Anna Kristina Samson 3, Una Olsen 3, Annika Ljósstein 3, Bára S. Klakstein 2

**Brotskøst:** VB 6(6), Stjørnan 12(7)
**Útvísingar:** VB 6, Stjørnan 5
**Dómarar:** Brandur Johansen og Heri Petersen — løgdu eina harða linju beinan vegin, og teir hildu linjuna allan dystin, hóast hon kostaði nógvar útvísingar og ein hóp av brotskøstum. Slíkir dystir eru altíð truplir at døma, men hoyvíkingarnir komu væl frá uppgávuni. Teir hildu høvdið kalt, tá ið spenningurin var í hæddini, og tað er neyðugt í slíkum dystum.
**Áskoðarar:** Ein rúgva

seg til, og tað gjørdi eisini mun, tá ið landsliðsleikarin Gurið Mortensen, ið er heima í páskafrí, kom á vøllin miðskeiðis í fyrra hálvleiki.

VB togaði seg inn á Stjørnuna, og tað eydnaðist heimaliðnum at minka um munin niður í fýra mál, áðrenn farið var til hálvleiks, og tí tóktist einki avgjørt í steðginum.

### Stjørnan fekk ikki mál

Byrjanin í seinna hálvleiki var eitt ógvuliga avgerandi tíðarskeið í dystinum. Tá hendi nevnliga tað, at Stjørnan fullkomiliga steðgaði upp, og hesum gjørdi heimaliðið sær dælt av.

Stjørnan var á odda 16-12 í steðginum, men henda leiðsla helt sær ikki leingi. Tí VB tók seg mál fyri mál inn á Stjørnuna, og tá ið gestirnir als ikki megnaðu at svara aftur í hinum endanum, eydnaðist tað enntá heimaliðnum at leggja seg á odda.

Stjørnan megnaði als ikki at skora fyrstu ellivu minuttirnar av seinna hálvleiki, og tí var hálvleiksleiðslan hjá teimum skjótt etin upp, og ístaðin legði VB seg á odda 18-16, áðrenn Stjørnan glógvaði aftur.

Síðani gekk tað rættuliga javnt á, og tað er einki at taka seg aftur í, at tað var stórur spenningur, og øll tann stóra áskoðarafjøldin var á gosi. Tað vóru ikki bert vágbingar til dystin, men eisini fólk aðrastaðnis úr oynni, og rættuliga fitt av klaksvíkingum høvdu eisini lagt leiðina suður til Vágs. Onkur áskoðari gjørdist so mikið heitur, at dómararnir noyddust at steðga dystinum og vísa manninum úr høllini. Tað er harmiligt, at slíkt skal koma fyri, men áskoðarar eiga at verða so mikið at sær komnir, at teir velja at nýta orkuna uppá at stuðla sínum liði heldur enn at finnast at dómarunum.

### Daiva var avgerandi leikarin

Tá ið VB hevði fullkomiliga vent dystinum, vóru tað fleiri, ið hildu, at nú var Stjørnan "knekkað", men so var ikki.

Klaksvíkskvinnurnar vístu sera góðan stríðsvilja, og tær fingu aftur fótin fyri seg. Tær bardu seg upp á javnt, og tær narkaðust alsamt sigrinum aftur. Ikki minst var tað verjan hjá Stjørnuni, sum hesa løtuna var heilt framúr, ið gjørdi sítt til, at tær komu fyri seg aftur.

Farið var nú undir teir seinastu tíggju minuttirnar, og tað tóktist nú sum um, at tað var Stjørnan, ið hevði sálarligu yvirvágina. Tær løgdu seg eisini á odda 26-24, men VB svaraði aftur og kom upp á javnt, 26-26, og spenningurin var øgiligur. Tað hoyrdist næstan ikki mannamál, og tað mundu verða nógvar negl, ið blivu styttar munandi hesa løtuna.

Tveir minuttir fyri leiklok stóð eisini á jøvnum, 27-27, og tað lá líkasum í luftini, at næsta málið fór at verða avgerandi, tí málini vóru ikki so títt. Tað var Daiva Tomaite, sum fekk næsta málið í dystinum, tá ið hon legði VB á odda 28-27. Daiva var heilt stóri spælarin í dystinum, og hon skeyt ikki færri enn 14 mál.

Stjørnan fór í álop, men tá ið Joan M. Djordjevic royndi at bróta seg gjøgnum verjuna hjá VB, mettu dómararnir, at talan var um álopsfeil, og tí fekk VB bóltin aftur, og minni enn ein hálvur minuttur var eftir at leika. Tey seinastu sekundini spældu vágskvinnur bara bóltin sínamillum og lótu tíðina ganga, og tá ið lúðurin ljóðaði, var ein øgiligur rómur í høllini. Ein rúgva av fólki rann út á vøllin at heiðra heimaliðnum, og venjarin hjá VB, Aivaras Daugas, kastaði seg bara skerflatan á búkin mitt úti á vøllin.

VB hevði bast greipuvinnarunum úr Stjørnuni og er nú tvey stig framman fyri klaksvíksliðið í toppinum í Sunset-kappingini. Harafturat er VB nærum 100 mál framman fyri Stjørnuna í málmuni, og tey eru fá, ið trúgva uppá, at hendan leiðslan hjá VB ikki fer at halda sær til kappingarlok 30 apríl.